# Sølan av nýggjum akførum minkar framvegis



**Hagtøl frá Bileftirlitinum fyri søluna av nýggjum akførum fyrstu fimm mánaðirnar í ár, vísa, at eitt nú sølan av nýggjum persónbilum er minkað við 17,5 prosentum í mun til í fjør**

AKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bileftirlitið hevur sent út tíðindaskriv við hagtølum yvir skráseting av nýggjum akførum teir fyrstu fimm mánaðirnar í 2004.

Í ár eru seldir 448 persónbilar í mun til 543 sama tíðarskeið í fjør, og av vørubilum eru seldir 79 í mun til 119 í fjør.

Eftir at bilasølan so gott sum steðgaði upp undir búskaparkreppuni fyrst í 90-unum, kom gongd á aftur í 1996, og bilasølan var vaksandi í fleiri ár.

Roknað varð við at sølan fór at stabilisera seg, men seinastu tvey árini hava búskaparligu útlitini ikki verið so góð, og bilasølan er minkað munandi hesi árini.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-MAI í 2004 og 2003**

| Akfaraslag | Mai 2004 | Mai 2003 | Broyting Mai 04/03 | Jan-Mai 2004 | Jan-Mai 2003 | broyting 2004/2003 | %broyting 2004/2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Bussar | 0 | 1 | -1 | 1 | 3 | -2 | -66,67% |
| Kampingvogn | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | |
| Hýrubilar | 7 | 1 | 6 | 16 | 8 | 8 | 100,00% |
| Lastbilar | 0 | 0 | 0 | 7 | 1 | 6 | 600,00% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | -4 | -100,00% |
| Motorsúkkla | 2 | 1 | 1 | 6 | 5 | 1 | 20,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Persónbilar | 113 | 121 | -8 | 448 | 543 | -95 | 17,50% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 2 | 3 | -1 | -33,33% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 | -3 | -100,00% |
| Viðfestivognar | 15 | 11 | 4 | 44 | 35 | 9 | 25,71% |
| Vøruvognar | 11 | 28 | -17 | 79 | 119 | -40 | -33,61% |
| **Samlað** | **150** | **163** | **-13** | **606** | **726** | **-120** | **-16,53%** |

**Í mai 2004 eru skrásett 25 n‡ggj prutl og higartil í ár eru skrásett 76 n‡ggj prutl.**

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Richard Mikkelsen deyður



Fyrrverandi danski tjóðbankastjórin, Richard Mikkelsen, andaðist 2. juni. Hann gjørdist 84 ára gamal.

Føroyingar kenna Richard Mikkelsen fyri leiklut hansara í samband við Fíggingargrunnin frá 1992, sum varð settur á stovn í kjalarvørrinum av kreppuni sum var, tá føroysku peningastovnarnir komu í fíggjarliga trupulleikar.

Hóast atfinningarnar at arbeiðshátti hansara vóru hvassar frá føroyskari síðu, helt hann alla sína tíð fast við, at tað, hann gjørdi, var rætt.

Richard Mikkelsen varð føddur 27. apríl 1920 í Keypmannahavn, sonur Julie, f. Schultz, og Martin Mikkelsen. Pápin var bilmekanikari.

Richard Mikkelsen bleiv studentur í 1947 og cand. polit. í 1953. Hann byrjaði sum assistentur í Danmarks Nationalbank og arbeiddi seg upp, til hann bleiv stjóri har í 1982 og sat til 1990. Hann hevði eisini fleiri nevndarsessir og sat t.d. í stýrinum fyri Den europæiske Valutaoverenskomst, Industriens Hypotekfond, Dansk Eksportfinansforbund og Industriens Realkreditfond. Í Fíggingargrunninum frá 1992 sat hann frá 1992-96.

Hann gav í 2001 út bók um bankamálið, sum hann nevndi »Færøerne i bankkrisens tegn«, har hann segði sína hugsan um hetta mál.

Hann hevur eisini skrivað bøkurnar, "Dansk Pengehistorie 1960-1990", og "Marshall-Hjælpen og Den Europæiske Betalingsunion".

Richard Mikkelsen var aftur í Føroyum, stutt áðrenn hann doyði.

Konan, Ester, sum hann giftist við í 1944, doyði í 1993.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd.

## Dagurin

**8. juni. Medardus**, deyður umleið ár 560. Biskupur í St. Quentin og Tourai í Fraklandi. Í Fraklandi er hann verndari hjá øllum teimum, sum hava víngarðar, og hjá øllum bryggjarum.

## Minningarhald

Sagt verður frá, at minningarhald fyri okkara kæra bróður, mammu- og pápabeiggja, ommu- og abbabeiggja

**Sigvald Hentze**
Hvalba

fallin í Norðbergi 1. mai 2004, verður í Hvalbiar kirkju sunnudagin hin 13. juni 2004 kl. 13.30.

**Familjan**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jákup Frants Larsen, Fuglafjørður:

# Ímyndin av kommununi í Fuglafirði

**Fríggjadagin 4. juni bjóðaði býráðið í Fuglafirði til móttøku í býráðshúsinum í sambandi við at Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari, hevði verið í starvi hjá kommununi í 30 ár**



*Borgarstjórin, Sigurð Simonsen (t.h.), handar her Jákupi Frants eina gávu frá Fuglafirðar Kommunu*

*Mynd: Pætur Joensen*

Jákup Frants Larsen er kanska meiri enn nakar annar ímyndin av kommununi í Fuglafirði, og tað sást eisini, tá móttøkan var, og ein rúgva av fólkið hugdi inn á gólvið.

Kommunuskrivarin var bara 21 ára gamal, tá hann kom í starv hjá Fuglafjarðar Kommunu. Hann var liðugur í studentaskúlanum í Hoydølum í 1972.

Á sumri í 1974 var hann sloppin inn á læraraskúla og inn á lærdan háskúla at lesa løgfrøði, men so var tað, at kommunan søkti eftir einum skrivstovumanni, hann søkti, fekk arbeiðið, og so hugsaði eg sum so, at hetta var vert at royna, og síðani havi eg verið her, og eg havi havt eitt spennandi og fjølbroytt starv.

Tá hann kom í starv hjá kommununi í 1974, var Ditleif Eldevig formaður í kommununi. Hann sat fram til og við 1976. Kommunuskrivari var Obert Eliasen. Av heilsuávum fór hann úr starvinum 1. august 1975, og so røkti Jákup Frants skrivarauppgávunua inntil tað í 1976 varð lýst eftir nýggjum skrivara. Jákup Frants søkti, fekk starvið og hevur formliga sitið í skrivarastarvinum síðani 1. desember 1976.

Sambært starvsfólkareglugerðini hjá kommununi, sum varð góðkend av landsstýrinum í november 1998, er kommunuskrivarin næsti fyrisitingarligi maðurin hjá býráðsformanninum.

Á móttøkuni seinasta fríggjadag vóru fleiri sum hildu talu fyri býráðsskrivaranum sum t.d. Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði, Sjúrður Eliasen, borgarstjóri í Leirvík, Dagfinnur Danbjørg, lærari í Fuglafirði, Jens Marius Poulsen, frá Tórshavnar Kommunu, Frits Johannesen lærari og listamaður í Fuglafirði, Dánjal Vang, formaður í teknisku nevnd í Fuglafirði, og Petur Martin Petersen, frá Kunningarstovuni í Fuglafirði.

Hesi 30 árini eru stórar íløgur gjørdar í eitt nú havnarlag, fótbóltsvøll og ítróttarhøll, barnagarð, kirkjugarð, eldrasambýli, byggibúning og skúlabygging.

Jákup Frants sigur at honum dámar ógvuliga væl arbeiðið. Tað er hugaligt at samskifta við fuglfirðingar, landsmyndugleikarnar og aðrar kommunur, stovnar og fyritøkur og at samstarva við hini á kommunuskrivstovuni og lokalpolitikarnar.

Jákup Frants hevur stóran áhuga fyri ítrótti, serliga fótbólti og flogbólti, hann var í mong ár nevndarlimur og kassameitari hjá ÍF. Hann spældi við í 1. delild hjá ÍF í átta ár, árini 1971-78.

Hann er limur í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør og eigur trý ellisakfør – tveir bilar og eina motorsúkklu. Eisini samlar hann upp á modellbilar- og motorsúkklur.

Jákup Frants er giftur við Marjun, f, Mortensen, úr Oyndarfirði, og tey eiga tríggjar synir: Erling, Petur og Einar.



*Yvir av Sigurði Simonsen sita: borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen, Dinna Jensen, býráðsskrivari í Runavík, og Sjúrður Eliasen borgarsstjóri í Leirvík*

*Mynd: Pætur Joensen*



*Sigurð Simonsen, borgarstjóri, heldur talu fyri Jákup Frants á 30 ára starvsdegnum, f.v. Ása Midjord, Alexanda Johannesen og Petur Larsen, sonur Jákup Frants*

*Mynd: Pætur Joensen*



*Jákup Frants saman við konuni, Marjun, Katrin í Horni (aftanfyri), Aspa Joensen og Pól Jóhannes í Horni, kommunulækni í Fuglafirði*

*Mynd: Pætur Joensen*